## Fyrisiting neyðug

Skulu Føroyar gera seg galdandi í altjóðagerðini, mugu vit fáa eina veruliga umhvørvisfyrisiting. Tað sigur Jákup Pauli Joensen, sum er leiðari á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum nú í tveir mánaðir hevur hann arbeitt í íslendska umhvørvismálaráðnum. Íslendska umhvørvisfyrisitingin kostar 450 mió. krónur um árið, og ein tilsvarandi føroysk fyrisiting hevði kostað 75 mió. krónur, sigur Jákup Pauli Joensen.

(Kelda: www.utvarp.fo)

## Opera í Fuglafirði

Sunnudagin 21, januar verður forvitnislig konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tá fara hjúnini Rúni og Susanne Brattaberg at syngja kendar operaariur av so frægum tónasmiðum sum Mozart, Verdi og Wagner. Við klaverið situr Johannes Andreassen. Rúni er basssangari, meðan Susanne er sopranur. Rúni arbeiðir fyri tað mesta í Týsklandi, Susanne er lærari í klassiskum sangi, og Johannes er lærari á Føroya Musikkskúla.

# Hava brúk fyri 165 fólkum



*- Tað er ein veruligur vandi fyri, at hevur eitt virki ov lítið av fiski, verða tað útlendingarnir, sum sleppa til arbeiðis og føroyingarnir, sum verða noyddir at ganga hendur í lumma, siga umboðini hjá arbeiðarafeløgunum í Arbeiðsmarknaðarráðnum*

*Savnsmynd*

| *Virki* | *Rein-skerarar* | *Onnur* | *Tils.* |
|---|---|---|---|
| **Streymoy:** | | | |
| Fiskavirking í Vestmanna | 15 | 5 | 20 |
| Vestsalmon | 0 | 30 | 30 |
| Fiskavirking í Havn | 15 | 0 | 15 |
| **Tilsamans í Streymoy** | **30** | **35** | **65** |
| | | | |
| **Eysturoy:** | | | |
| Fiskavirking í Runavík | 15 | 0 | 15 |
| Fiskavirking á Toftum | 5 | 0 | 5 |
| Norðís | 5 | 0 | 5 |
| Tavan | 12 | 0 | 12 |
| Fiskavirkið | 0 | 0 | 0 |
| Nevið | - | - | - |
| Farita | - | - | - |
| Vaðhorn | 0 | 0 | 0 |
| Viking | 0 | 0 | 0 |
| Faroe Marine Products | 0 | 0 | 0 |
| Á Bakka | 0 | 5 | 5 |
| **Tilsamans í Eysturoy** | **37** | **5** | **42** |
| | | | |
| **Norðoyggjar** | | | |
| Kósin | 10 | 10 | 20 |
| Norðfra | 0 | 0 | 0 |
| Eystís | 0 | 0 | 0 |
| Kryvjing | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans í Norðoyum** | **10** | **10** | **20** |
| | | | |
| **Vágar** | | | |
| Nofa | 0 | 0 | 0 |
| Fiskavirking í Miðvági | 10 | 5 | 15 |
| **Tilsamans í Vágum** | **10** | **5** | **15** |
| | | | |
| **Sandoy** | | | |
| Sandoy Seafood | 15 | 0 | 15 |
| **Tilsamans í Sandoy** | **15** | **0** | **15** |
| | | | |
| **Suðuroy** | | | |
| Fiskavirking í Vági | 0 | 0 | 0 |
| Fiskavirking á Tvøroyri | 8 | 0 | 8 |
| Delta | 0 | 0 | 0 |
| TG-Seafood | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans fyri Suðuroy** | **8** | **0** | **8** |
| | | | |
| **Tilsamans fyri landið** | **110** | **55** | **165** |

*Hesa talvuna hava umboðini fyri arbeiðsgevararnar í nýstovnaða Arbeiðsmarknaðarráðnum gjørt yvir trotið á arbeiðsmegi á føroysku fiskavirkjunum*

**Ein nýggj uppgerð vísir, at tað er so stórt trot á arbeiðsmegi í flakavinnuni, at tey føroysku fiskavirkini hava brúk fyri heili 165 fólkum afturat. Og tað er um alt landið, at brúk er fyri meiri fólki, hóast tørvurin er størstur í Streymoy og í Eysturoy. Nógv størstur tørvur er á reinskerarum**

TROT Á ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hendan talvan vísir, hvussu stórt trot er á arbeiðsmegi á teimum ymsum fiska og flakavirkjunum kring landið.

Her skal kortini havast í huga, at talan er um eina uppgerð, sum umboðini hjá arbeiðsgevarunum í Arbeiðsmarknaðarráðnum, hava gjørt.

Uppgerðin er gjørd eftir eitt spurnarumfar til øll fiskavirkini beint fyri jól.

Men, sum tað sæst í øðrum greinum, eru umboðini fyri Arbeiðarafeløgini als ikki samd í hesi uppgerðini, tí tey siga, at tørvurin er nógv minni enn tað, sum arbeiðsgevarar siga.

Sum tað sæst á talvuni er tað um alt landið, at brúk er fyri meiri arbeiðsmegi á flakavirkjunum. Kortini má sigast, at tørvurin er nógv størstur á virkjunum inni á meginøkinum, í Eysturoy og í Streymoy. Hinvegin eru suðuroyingar frægast fyri.

Tilsamans hava fiskavirkini kring landið brúk fyri 165 arbeiðsfólkum afturat, men nógv størstur tørvur er á reinskerarum.

### Óstøðugt fólk

Tað er eisini ógvuliga ymiskt, hvussu tey ymsu virkini kring landið meta um støðuna.

Bæði Fiskavirking á Toftum, Fiskavirking í Runavík og Delta á Tvøroyri, upplýsa, at tað er torført at fáa fólk við røttu førleikunum. Fiskavirking í Havn sigur, at arbeiðsmegin er óstøðug. Á Vestsalmon noyðast tey at hava skúlabørn til arbeiðis og har arbeiða tey bara eina vakt, hóast tey kundu arbeitt tvær.

Á Bakka siga tey, at ímóti sumri verður brúk fyri einum 10 fólkum afturat og eisini á Kryvjing fáa tey brúk fyri meiri fólkið í ár.

Á Kósavirkið í Klaksvík noyðist at læna fólk frá Tekniska Skúla fyri at fáa tað at bera til.

Hóast Sandoy er lítil oyggj, hava tey harðliga brúk fyri fleiri fólkum. Men har er onki fólk at fáa og tað fæst heldur onki fólk aðrastaðni frá, siga tey.

Í Suðuroy sigur Fiskavirking, at tey eru ikki rættiliga komin í gongd í Vági enn, men tá ið arbeiðið eisini verður í Vági, vænta tey, at tað verður torført at fáa arbeiðsmegi bæði til virkið í Vági og tað á Tvøroyri.

Annars sigur Fiskavirking í Suðuroy, at arbeiðsmegin er sera óstøðug. Tað gongur striltið at fáa fólk at møta seinnapartar og fríggjadagar.

Tað hevur áður verið upplýst í Sosialinum, at hetta trotið á arbeiðsmegi kostar føroysku flakavirkjunum minst 300.000 krónur um dagin, tí tey fáa ikki virka fiskin, so nógv, sum tey vildu og tey fáa heldur ikki tikið ímóti so nógvum fiski, sum tey vildu.